Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Gøtudalstunnilin

Spurningar:

1. Hvussu gongur við at fyrireika verkætlanina Gøtudalstunnil?
2. Er liðugt at gera jarðfrøðiligu kanningarnar av økinum, har tunnilin ætlandi skal verða?
3. Hvat siga kanningarnar um møguleikan at gera tunnilin?
4. Verður Gøtudalstunnilin við í eini komandi langtíðarløguætlan?

Viðmerkingar:

Í 2019 vóru tvey jarðfrøðilig hol borað ávikavist við Varmakeldueiðið og omanfyri Syðrugøtu í sambandi við Gøtudalstunnilin. Táverandi landsstýrismaður við samferðslumálum upplýsti í svari til ein § 52a fyrispurning í 2020, at tá ið endaligu niðurstøðurnar frá jarðfrøðiligu kanningunum fyrilógu, fór at bera til at fara víðari við fyrireikingunum og leggja tunnilslinjuna við atliti til jarðfrøðina.

Eisini upplýsti landsstýrismaðurin, at arbeitt bleiv við eini langtíðarløguætlan, har støða millum annað skuldi takast til, hvussu ein játtan til Gøtudalstunnil skuldi verða raðfest.

Nú mesta samferðslan millum Havnina, Eysturoynna og Norðoyggjar fer ígjøgnum Eysturoyartunnilin, er upplagt at brúka vestara arm á Skálafjørðinum til ferðsluna til og úr økinum eystanfyri Gøtueiði. Í tí sambandi hevði Gøtudalstunnilin gjørt góðan mun, bæði fyri at minka um ferðsluna gjøgnum bygdu økini á eystursíðuni á Skálafjørðinum, og ikki minst fyri at sleppa uttanum Gøtueiði, har hálka oftra er ein trupulleiki.

Hesin fyrispurningurin verður settur, fyri at fáa greiðu á, hvar málið liggur, og hvat víðari fer at henda við málinum.

Á Løgtingi, 25. mai 2023

Helgi Abrahamsen